# Lisa og Hanna



## Systrarnar fara á botn

Lisa Hendriksdóttir, t.v., og Hanna Rubeksen eru systrar og næstan javngamlar. Tær hava børn og mann og hús og djór og bil og fulltíðarstørv og alt hattarhar, sum ger, at man viðhvørt hevur hug at renna skríggjandi vekk. Tær hava avtalað at hjálpa til við ruddingini heim hjá hvørji aðrari.

**Lisa**: Eg havi fleiri støð í húsinum, har ting liggja alt ov leingi, áðrenn tey verða koyrd burtur. Bæði í kjallaranum og á ovastalofti eru alt ov nógvir krókar, sum eita »til viks«.
**Hanna sigur**: Eg eri so glað fyri, at maður mín einaferð segði, at hjá okkum skal onki upp á ovastaloft. So har er skralltómt.
**Lisa sigur**: Eg hugsi ofta, at kanska fái eg brúk fyri tí aftur. Men tað er so ræðuliga langt ímillum, at eg fái brúk fyri tí.
**Hanna sigur**: Garasjan er full og tað er irriterandi. Eg haldi, at eg dugi væl at koyra vekk, men tað skal líka standa í garasjuni í nakrar mánaðir, áðrenn eg finni útav, hvar tað so skal.
**Lisa**: Summi ting hava eina góða søgu, so tey skulu ikki vekk. Eg eigi ein gamlan leist hjá abbanum, sum var skómakari. Leisturin er ikki penur, men eg vil ikki av við hann.
**Hanna**: Men tað er munur á tingum við einari søgu og so tí, sum bara er skrambul, sum bara skal vekk ella víðari til onkran, sum hevur brúk fyri tí.

## Tú skalt víðari

Hugsa um, hvønn týdning og leiklut tingini hava fyri teg í lívinum beint nú. Klæðini í skápinum skulu avspegla teg, sum tú ert nú. Vel klæðir, sum tú kennir teg vakra og deiliga í, so tú trívist og verður glað. Gomul, slitin klæðir, sum tú ikki passar longur, umboða teg, sum tú vart einaferð. Men tú ert broytt og skalt víðari, og tí skulu gomul klæðir út!